

# Posta Stamps Føroyar

Nr. **11**

Februar 2012

ISSN 1603-0036

**Tríggjar nýggjar frímerkjaútgávur**

**Stamps.fo nú á sponskum og kinverskum**

**Framsýningin í Wuxi í Kina**

Posta

FAROE ISLANDS







FO 731-32

Royndarprent

# Norðurlandaútgávan 2012 -

## *Bjarging á sjónum*

Tað verður yvirhøvur ásannað, at av øllum arbeiðsplássum er havið tað vandamiklasta. Hetta rakar sjálvsagt fyrst og fremst tey lond, sum eru mest heft at havinum, og millum hesi eru Føroyar.

Tann størsta vanlukkan, Føroyar vita um, var millum 1580 og 1600. Tá brast hann ein dagin á við stormi av landnyrðingi, og 50 bátar gingu burtur. Hildið verður, at millum 200 og 300 menn druknaðu.Serliga vóru tað tristar, sum tá vanliga vórðu nýttir til útróður, sum ikki bóru boð í bý. Tá varð tað eftir hetta, bannað at fara til havs við so smáum bátum.

Henda fyrsta stóra vanlukkan gjørdist orsøkin til hetta helst fyrsta stig, at gera sjógvin tryggari sum arbeiðspláss.

Men framvegis var hópur av vanlukkum á sjónum, sum kravdu mannalív. Talið kann ikki uppgerast neyvt, men talan er um fleiri túsund.

Slupptíðin fyrra partin av undanfarnu øld kostaði mong mannalív, og heilar manningar kundu hvørva um somu tíð.

Frá hesi tíðini eru eisini frásagnir um ótrúligar bjargingar, sum tá ið "Ernestina" í 1930 í illveðri fór á eitt sker undir Íslandi, og Ziska Jacobsen svam í land við eini línu. Hetta bragd bjargaði 18 av teimum 27 monnunum, sum vóru við.

Tað skuldi, sum ofta er, ein vanlukka, til áðrenn verulig stig vórðu tikin til eina bjargingartænastu í Føroyum. Hetta hendi ikki fyrr enn í 1957, tá ið íslendski trolarin "Goðanes" sigldi á Flesjarnar við innsiglingina á Skálafjørðinum. Hóast góður vilji var at bjarga manningini, vóru Føroyar ikki útgjørdar til eina slíka støðu. Tískil doyði skiparin á "Goðanesi".

Tá kom dik á at seta á stovn bjargingarfeløg í Føroyum. Byrjanin var, at íslendska bjargingarfelagið, Slýsavarnafelag Íslands, gav føroyingum útgerð at bjarga manning av skipi við línu og bjargingarstóli. Tey bjargingarfeløg, sum vóru stovnað eftir hetta, hava verið væl útgjørd og hava verið dygg, tá ið tørvur hevur verið fyri teimum.

Hóast hetta so gekk rættiliga long tíð, áðrenn tað almenna í Føroyum skipaði eina miðvísa bjargingartænastu. Hetta hendi í 1976, tá ið Vaktar- og Bjargingartænastan varð sett á stovn. Navnið varð seinni broytt til Fiskiveiðieftirlitið.




Mynd: Ólavur Frederiksen

Umframt vanligt fiskiveiðieftirlit er eisini álagt stovninum at luttaka í leiting og bjarging á sjónum í samstarvi við MRCC, Maritime Rescue Co-ordination Center, í Tórshavn.

Fiskiveiðieftirlitið hevur eisini sáttmála við Tryggingarfelagið Føroyar um samstarv. Uppgávur í hesum sambandi snúgva seg mest um sleip og kavarahjálp.

Fiskiveiðieftirlitið og Skipaeftirlitið samstarva eisini, tá ið talan er um manningarviðurskifti á føroyskum skipum. Fiskiveiðieftirlitið ger kanningar av manningarskjølum, meðan skip eru til fiskiskap, og hevur heimild at geva skipum boð at fylgja við til lands, um brot verða staðfest á manningar- og mynstringarreglur.

MRCC virkar saman við Tórshavn Radio sum ein samanlagdur stovnur undir Fiskimálaráðnum.

MRCC Tórshavn hevur ábyrgdina fyri íverksetan og samskipan av leiting og bjarging á føroyskari havleið. Hetta er tað, sum á enskum eitur SAR ( Search and Rescue). Samarbeiðsavtalur eru gjørdar við ymsar partar, so sum Atlantic Helicopters, Færøernes Kommando, Fiskiveiðieftirlitið og harumframt við grannalondini um veiting av hjálp í samband við neyðstøður.

Aðrar uppgávur hjá MRCC Tórshavn umfata at taka ímóti fráboðan um oljudálking á føroyskum havleiðum, sjúkraflutning við tyrlu, avgreiða boð um yvirgang á føroyskum skipum (ISPS) og at gera og lýsa siglingarávaringar.

Vanliga virkisøki hjá MRCC Tórshavn er havleiðin úr fjøruni og út á 200 fjórðingamarkið ella miðlinjuna millum lond. Støðin er mannað alt samdøgrið og allar dagar.

Eisini er nú ásett við lóg, at allir sum fara til sjós, skulu hava trygdarskeið, so manningin kann vera væl tilbúgvin, um nakað skuldi hent.

Umframt øll hesi tiltøk eru skipini eisini betur og betur útgjørd, eisini á trygdarøkinum.

Hetta hevur eisini merkt, at sjólívið er munandi tryggari enn tað hevur verið fyrr og sjóvinnan kann í dag sigast at vera ein trygg vinnan. Sjólát kunnu í dag sigast at vera sjáldsom. Men kortini má ásannast, at fullkomin trygd kann ikki tryggjast. Men hendir nakað, so verður alt gjørt, sum gerast kann fyri at bjarga mannalívum.

*Óli Jacobsen*






FO 733-734

Royndarprent

TÓRSHAVN · ÚTGÁVUDAGIN
Vitjið Føroyar
30 · 4 · 2012

# Europa 2012 - vitjið Føroyar

**Kom til Føroya**

Brimdun, skríggjandi sjófuglur – skiftandi ljós ið kann avskepla fjøll. Litirnir, ljóðini, sansaligt lokkaspæl – umskiftið bygt í sjálvt harðastu hellu. Ævinleikin dunar í rúmd og í tíð, men á fáum støðum so týðiliga sum í Føroyum.

Tað kann kanska tykjast løgið, at Føroyar í roynd og veru eru eitt lokkandi ferðamál. Her eru ongar tropiskar strendur, ongi hópframleidd hotell, hvørki baðilond ella tær vanligu turistfellurnar ið finnast so manga aðrastaðnis.

Og tó er áhugin fyri Føroyum sum ferðamál alsamt vaksandi. Í einari umfatandi kanning frá 2007, ið fevndi um 111 oyggjasamfeløg, valdi National Geographic Traveller Føroyar til heimsins mest dámliga oyggjaferðamál. Í desember í fjør valdi The Daily Mail Føroyar sum eitt av 10 teimum bestu ferðamálunum í 2012.

Áhugin fyri oyggjunum er vaksin munandi tey seinastu árini, alt eftir at roynd ferðavinnublaðfólk, og fólk við serligum áhuga fyri alternativum ferðum, hava varnast ferðamálið.

Og áhugin er ikki uttan orsøk. Óspilt umhvørvi og mentan, eitt vælgjørt ferðakervi og góð støð at gista, lokka fólk ið hava áhuga í øðrum enn sól og sandstrondum. Vakurleikin í okkara harðligu landsløgum er víðagitin og stimbrar sansir og bragdarhug. At ganga í fjøllunum, sigla undir fuglabjørgum og innar í helli - ella bara seta seg á ein stein og kenna náttúruna seta í sál og sinn – her er pláss fyri øllum. Óspilt bjørg har fuglurin eigur – havsins loyndarmál yvir og undir – jarðfrøðilig fyribrigdi úr ótaldum øldum – tað villa, tað óspilta, tað ørandi eggjandi.

Ársins EUROPA frímerki geva eitt lítið innlit í, hvat tann ferðandi kann vænta sær av einari aktivari ferð til Føroya. Túrar í náttúruni á landi og á sjógvi. At stara niður í avgrundina av einari egg í Norðoyggjum – ella ein ørandi túr við báti undir fuglabjørgini í Suðuroy – bara tvey dømi um tey spennandi tilboð ið bíða tí ferðandi.

Og júst sum villa náttúran, hevur tað



Mynd: Eyðbjørn Jacobsen

eyðkenda mentanarlandslagið eisini sítt at bjóða tí ferðandi. Slóðir heilt aftur til jarnaldar landnám. Toftir úr víkingatíð, miðaldar bóndahús, væl røktað hús úr farnum øldum. Múrurin í Kirkjubø, ið stendur sum ein minnisvarði yvir vald og marglæti hjá miðaldarkirkjuni. Fornminnissøvnini um landið, ið veita innlit í litríku føroysku søguna.

Og, at enda, nútíðarsamfelagið. Frá kaffistovum og náttarlívinum í Havn, teimum mongu mentanartilboðunum - til dagliga lívið á bygd og í bý. Bygdastevnur og tónleikafestivalar, føroyskur dansur og rockkonsertir. Listaframsýningar og bókmentalig tiltøk – føroyska mentanarlívið er líka so litríkt og fjølbroytt sum húsini á bygd.

Nei – tað er ikki lívið á strondini ein skal vænta at finna í Føroyum. Heldur lívið í einari harðari og ótamdari náttúru – vakurleikin í tí stórbæra og í tí skiftandi. Gestablíð fólk, ið, hóast tey liva í einum fremmandum umhvørvi, eru sjáldsama heimsborgarlig, málkøn og kunnug um útheimin. Eitt nútíðarsamfelag merkt av sínum umhvørvi og sínari søgu.

Ein kann ferðast til Føroya bæði sjóvegis og loftvegis.

Reiðaríið Smyril Line bjóðar flutning við nútímans atlantsferjuni Norrøna, ið flytir bæði ferðafólk og bilar. Tú kanst vitja teirra heimasíðu: www.smyrilline.com og kunnað teg um fráferðir og prísir.

Flogfelagið Atlantic Airways flýgur dagliga aftur og fram millum Føroya og Danmark. Kunning um ferðing og prísir eru at finna á: www.atlantic.fo

Vælkomin til Føroya. Vit skulu gera okkara besta fyri at geva tær eina uppliving fyri lívið.




FO 735-38













Royndarprent

# Skrímsl

**Grýla, marra, niðagrísur og fjørutrøll**

Hin gamla pátrúgvin snýr seg ofta um viðurskifti á markinum millum hin kenda heimin og ein vandamiklan umheim, ið fólk firnaðust, ella millum rætt og skeivt, antin ásett av verðsligum fyriskipanum og lógum ella av siðvenju. Pátrúgvin um niðagrís snýr seg um eina álvarsliga brotsgerð, grýlan ið kemur eftir børnum, snýr seg um eina kirkjuliga fyriskipan, fjørutrøllini um álvarsligan vanda og hugmyndin um marruna, sigur frá heilsuligum og sálarligum trega, ið flestu fólk kenna til.

**Grýla**

Á fastalávint ganga børnini grýla. Tey lata seg í grýluklæðir og grýluskort, vitja í húsunum og fáa okkurt gott ella pengar. Spyrt tú, hvussu grýlurnar eita, gera børnini seg grovmælt og siga okkurt navn, ið gjarna sipar til trøll og bústað burtur frá fólki – í fjøllunum ella fjøruni.

Hetta er aldargamal siður, sum hetta grýluørindi sigur frá:

*Oman kemur grýla frá gørðum*
*við fjøruti hølum,*
*við bjálg á baki,*
*skálm í hendi,*
*kemur eftir børnum*
*ið gráta eftir kjøti í føstu.*

Føstan byrjar eftir gamlari kirkjuligari fyriskipan mikudagin í sjeyndu viku fyri páskir. Hon verður hildin til minnis um Jesu føstu í 40 dagar í oyðimørkini.

Dagarnir áðrenn føstan byrjar eru veitsludagar við nógvum skemti, tí nú skal friður valda til páskir. Hesar høgtíðsdagarnar verða nógvar veitslur hildnar, tunnusláttur er nógvastaðni, og børnini ganga grýla.

Í nógvum katólskum londum verða stórar karnevalsveitslur hildnar hesar dagar, har hitt stóra karnevalið í Rio man vera hin mest kenda. Hagar kemur fólk úr øllum heiminum at hyggja at og taka lut í haldinum við dansi, tónleiki og framførslum




av ymsum slag, og luttakararnir lata seg í litføgur klæði og hava skortar fyri andlitið. Soleiðis sum børnini gera í Føroyum.

Søgn er at Gæsa í Kirkjubø átti alla Suðurstreymoy, men misti hana, tí hon hevði etið kjøt í føstu.  Ørindið hevur eins og summir aðrir gamlir siðir, soleiðis eina lærandi ætlan at ræða børnini ikki at munga eftir góðum mati í føstuni, ið man hava kenst drúgv hjá mongum. Ein tanki við føstuni hevur verið at venda huganum frá verðsligum freistingum og stilla sinnið meira til hitt andaliga. Heppið er tað tá, at føstan er ta árstíðina, tá minst var til av góðum feskum mati, tá neytini ofta vóru slept, kjøtið uppi í hjallinum, veðurlíkindini vánalig til útróður, fuglurin enn ikki komin aftur eftir veturin og enn eingin gróður í moldini.

Enn ganga børnini grýla, men nýggir siðir taka seg upp, og grýlugongan á fastalávint fær nú kapping frá grýluveitsluni Halloween, ið verður hildin í enskmæltum londum hin 31. oktober.

**Marra**

Marran kemur á nátt og setur ella leggur seg oman á fólk í svøvni.  Tey fáa ófriðarligan svøvn við ringum dreymum og trongum andadrátti, og tá tey vakna kenna tey seg mødd og óhvíld. Hammershaimb sigur, at marran líkist fagrastu gentu, men at hon er hitt versta trøll. Marran liggur og trýstur so fast á bringuna á tí sovandi og tyngir kroppin so niður, at tey fáa ikki andað og ei heldur rørt seg. Hon roynir at sleppa við fingrunum inn í munnin at telja tennirnar, og eydnast tað, missir hin sovandi lív.

Øll fólk kenna hetta stundum at sova illa, kenna tronga fyri bróstinum, fáa ikki drigið ondina og ræðukendar dreymar. Slíkt kann ivaleyst hava ymiskar orsakir, ampar av onkrum slag, sjúka, ovát og annað órógva sinni og hvíld. Almenn fyribrigdi sum hesi eru grund undir pátrúnni um marruna. Umráðandi er finna sær lætta, og ráð eru eisini um tað í pátrúnni.

Hjá Hammershaimb finna vit hesi ørindi, ið skula avdúka, um marra er inni í stovuni:



# Marran

*Marra, marra, minni,/ ert tú her inni,/ minnist tú ikki slagið tað,/ ið Sjúrður Sigmundarson gav tær/ í granarbeinið á sinni?/ Marra, marra, minni,/ ert tú her inni,/ út skalt tú fara,/ bera bæði mold og flag/ og alt, ið her er inni./*

Hammershaimb nevnir eisini, at hjálp er í at balla ein knív inn í ein klút ella sokkaband, ið er tvífalt lagt í helvt, og skifta hann hond úr hond tríggjar ferðir rundan um teg, meðan tú sigur ørindini. Eini onnur ráð kunna vera at seta skógvarnar framman fyri seingina við trantunum vendum úteftir. Tá hevur hon ilt við at sleppa upp í seingina. Pátrúgv, ið líkist tí føroysku um marruna, er kend frá elstu tíðum og í øllum mentanum.

Í nógvum førum hevur marran verið hildin at vera eitt kent fólk, ið skapar seg til marru um náttina og ger ónáðir. Eitt konufólk, ið kemur til mannfólk sum marra og maður, ið kemur sum marra til konufólk. So sterk hava fólk summastaðni verið í marrutrúnni, at í elsta norska kristinrættinum eru ásettar bøtur sum revsing til fólk, ið hava skapt seg um til marru og gjørt ónáðir.
Nógva staðni ríður ella flýgur marra gjøgnum luftina. Tí er hon eisini komin í bland summastaðni við pátrúnna um heksir, tí hildið var at tær flugu á kustaskøftum um næturnar til Bloksbjørg at halda til saman við Illamanni. Upprunaliga hevur marran einki við heksapátrúgv at gera, men ein líkskapur er í tí, at talan er um tramansskap í báðum førum. Tí var eisini sagt í Føroyum, at marran tolir ikki at hoyra Jesus navnið sagt. Tá rýmir hon.

Pátrúgvin um marruna er valla til longur, men vit siga enn á føroyskum at hava marruna, tá vit hava havt ringar dreymir og kenna okkum ikki væl hvíld á morgni. Í nakað fluttari merking kunna vit siga um onkra plágu, at hasin ella hatta ríður mær sum ein marra.

**Niðagrísur**

Niðagrísur er lítil, tjúkkur og bøllutur, sum eitt lítið reivabarn ella stórt noða, dimmreyður at liti.

Fyrr søgdu tey, at niðagrísar vóru leysingabørn, ið vórðu átt í loyndum, dripin og grivin, onga hvíld fingu í deyðanum, men gingu aftur á fólk. Orsøkin var mest tann, at hesi børn einki navn høvdu fingið.

Við navninum fær nýføðingurin pláss sum fólk millum onnur. Í húskinum, bygdini og samfelagnum. Nýføðingurin verður ein persónur. Navnið fylgir einum í lívinum og í

# Niðagrísur



deyðanum, tá tað verður skrivað á lista og sett á gravsteinin.  Hitt burturbeinda leysingabarnið fær einki navn, tað er óynskt og verður tagt burtur. Tað verður ongantíð eitt fólk millum onnur.

Fólk hildu tí hesi leysingabørn ganga aftur og amast upp á fólk sum niðagrísar við vón um at fáa navn. Eydnaðist tað, sást ikki niðagrísurin aftur. Heitið niðagrísur sipar til, at tað ikki fær skap sum fólk, og heldur ikki eigur lut í kristnari sælu.  Onkur granskari heldur upprunan vera at finna í undankristnari tíð, tí tað er ikki kristna innihaldinum í dópssakramentinum, niðagrísurin tráar eftir, men bert navninum.

Ein søgn sigur, at við Loddasa stein á Skála helt ein niðagrísur til og voldi fólki ampa, tí hann rullaði millum føturnar á teimum fyri at gera vart við seg. Ein maður ilskaðist einaferð inn á hann og helt fyri: "Hasin loddasin!" Tá vil søgnin vera við, at niðagrísurin gróv seg niður í jørðina og sást ikki aftur, nú hann var nevndur.

Á Viðareiði átti ein arbeiðskona leysingabarn í loyndum. Hon drap tað, ballaði tað inn í eitt hosuleggald (hosa við ongum leisti) hjá húskallinum Písla og gróv tað niður. Seinni giftist arbeiðskonan, men í brúdleypinum kom ein niðagrísur í einum hosuleggaldi bóltandi inn í dansin og kvað: "Min moder bærer guld, jeg danser i muld, jeg danser i hosuleggald Písla." Hesin niðagrísur fær einki navn, men tað er eyðsæð, at hann vil gera vart við seg við navninum á tí, sum átti hosuleggaldi. Nærri einum navni kom hann ikki, neyðardýrið. Í Skotlandi er eisini kenda søga um ein niðagrís í einum hosuleggaldi.

Sagnir sum hesar bera skilligt boð um, hvussu umráðandi tað altíð hevur verið í okkara mentan við navninum sum eyðmerki fyri beraran. Ikki minni fyrr enn nú. Sjáldan hevur orðaskiftið á løgtingi verið meira kensluborið og uppreitt enn tá fyrsta navnalógin var samtykt í 1992. Seinni er hon broytt tvær ferðir og nógv linkað, tí fólk góðtaka ikki annað, enn sjálv at geva børnunum navn við serligum sniði, ið hevur nakað at siga hjá teimum.

# Fjørutrøll



**Fjørutrøll**
Hægst í fjøllunum ella inni í berginum eru trøllabølini. Burtur í óbygdum og á ógongdum leiðum, har fólk ikki kom, ella í hvussu er har ringt var at koma til, søgdu tey fyrr, at trøllini hildu til. Í trøllaheiminum var myrkt og óunniligt, so eisini av sálarligum grundum var best at halda seg burtur av trøllaleið.

Trøllini vóru heiðin, og eisini tí var best at firnast tey. Tey vóru ein hóttan móti fólki,. vóru vandamikil og vildu gera seg inn á fólk.

Trøllasøgurnar vóru nógvar, men hvussu fast fólk veruliga trúðu upp á trøll, vita vit tó ikki ikki. Fleiri granskarar halda, at trøllasøgurnar fyrst og fremst skuldu ræða børn og kanska eisini vaksin til at halda seg burtur frá støðum, har tað var vandamikið at fara. Ikki minst í myrkri.

Í Hattarvík sigur søgnin, at eitt kvøldið í skýmingini tók eitt trøll eitt barn í bygdini. Ein gamal maður fór aftaná, og tað eydnaðist honum at fáa trøllið aftur niðri á bakkanum og fáa barnið frá tí. Trøllið leyp á sjógv, og tí søgdu tey  tað vera eitt fjørutrøll.

Sagt verður eisini frá einum øðrum fjørutrølli, sum kom upp á land í skýmingini. Tað skuldi vera øðiligt, nógvur tari vaks upp á tí, og tað dró nógv grót uppi í sær. Tað ljóðaði, sum at tað dró tveir mylnusteinar eftir sær, og sum at alt túnið var leyst og mól um koll undir fótunum á tí. So stórt var tað, at tað rakk upp um mønuna á einum húsum. At enda fekk ein maður manað tað niður, og so sást tað ikki aftur.

Hattarvík  er bygd fram við heldur høgum bakka fyri opnari vík, fjøran er ikki stór, har er atdjúpt og nógv brim. Tí er lætt at hugsa sær, at søgurnar um fjørutrøllini í Hattarvík hava hildið børnini burtur úr fjøruni og kanska eisini mint vaksin fólk á, ikki at fara har einsamøll og í myrkri.

*Eyðun Andreassen*



# Stamps.fo er nú eisini á sponskum og kinverskum

Føroyar eru sum kunnugt eitt lítið oyggjasamfelag og okkara mál hevur tískil eina rættuliga avmarkaða útbreiðslu. Tað hevur tí altíð verið neyðugt hjá føroyingum at duga fremmand mál fyri at kunna samskifta við umheimin.

Málkunnleikin er ein partur av mentanini: Fyri at yvirliva, fyri mentanarliga menning, ella bara fyri at fylgja við hvat fyriferst í útheiminum.

Síðan Posta í sjeytiárunum fór undir at geva frímerki út, hevur tað verið vanligt at útgeva kunningartilfar og samskifta við savnarar á fimm málum: enskum, týskum, fronskum, donskum og so sjálvandi føroyskum. Hettar hevur virkað væl, men eftirhondini sum globaliseringin hevur latið upp fyri marknaðum í nýggjum mál- og mentanarøkjum, er samskiftistørvurin eisini broyttur.

Tað er tí ikki uttan ein ávísan stoltleika, at vit nú kunnu føra okkum fram á tveimum av heimsins størstu og mest útbreiddu málum – kinverskum (mandarin) og sponskum. Framyvir verður alt kunningartilfar eisini tøkt á hesum málum á okkara heimasíðu – og beinleiðis samskifti umvegis t-post og vanligan post, verður nú eisini svarað á kinesiskum og sponskum.

Spanska síðan av www.stamps.fo varð tikin í nýtslu í januar í ár, og vit vænta at kinverska síðan verður klár í februar.

Vit ynskja øllum mandarin- og spansktalandi vælkomin til okkara lítla part av heimsmentanini, og vóna at tit finna fragd í at vitja okkara áhugaverda og litríka alheim.

Vinaliga
Svanbjørg Manai, stjóri
Posta Stamps




Teir mongu frímerkjasavnararnir bíða tolnir til teir sleppa inn í framsýningarhøllina



Jingrui Yan

# China 2011 - í Wuxi

Posta var við á framsýningini CHINA 2011, 27th Asian International Stamp, sum var hildin í Wuxi, sum eisni nevnist, "The Pearl of Lake Taihu", 11.- 15. November, 2011.

Umboðini fyri føroyar vóru Svanbjørg Manai og Jingrui Yan.

Jingrui Yan tey er ættað út Kina, men er gift við føroyingi, og tey búgva í Føroyum.

Tá heimasíðan stamps.fo verður tøk á kinverskum, so fer tað at verða Jingrui Yan, sum fer at hava samband við teir kinversku savnarnar, ið skriva til Posta Stamps á kinverskum.

Svanbjørg Manai, stjóri á Posta Stamps var sera væl nøgd við framsýningina. Hon sigur at tað var ein frægd at tosa við so nógvar kinverskar savnarar.

Tað er ætlanin at Posta seinni í ár aftur fer til Kina á frímerkjaframsýning. Tann framsýningin verður í Beijing í november 2012.

Vit vita at tað eru uml. 30 miljónir frímerkasavnarar í Kina. So tað er ein sera spennadi marknaður, sum vit gjarna vija læra meira um, sigur hon.










Svanbjørg Manai saman við tveimum kinverskum gentum, ið savna føroysk frímerki

Í samband við framsýningina var gjørt eitt serligt framsýningarstempul.

Til ber at bíleggja ein sokallaðan framsýningarbjálva við frímerki og hesum serstempli á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum.
Prísur: 15,00 kr.



# Framløga av frímerkjaútgávuni "Drotning í 40 ár"



F. v. Mikael Melbye, Joel undir Leitinum Svanbjørg Manai Martin Mörck



Mikael Melbye og Martin Mörck signera







Mikudagin 4. januar 2012 var framløga av frímerkjaútgávuni "Drotning í 40 ár". Hetta er felagsútgáva millum Danmark, Føroyar og Grønland, í samband við at Margrethe II hevur sitið á donsku trúnuni í 40 ár.

Framløgan var í Drabantsalen, á Christiansborg. Úr Føroyum vóru Joel undir Leitinum, stjóri á Posta og Svanbjørg Manai, stjóri á Posta Stamps umframt Kári Olsen frá Kringvarpi Føroya við til framløguna. Fleri innsløg vóru í morgunsendingini hjá útvarpinum frá hesum tiltaki. Tað gleðir okkum at føroyskir fjølmiðlar vísa føroyskum frímerkjum áhuga.

Høvi var at síggja frímerkini og hoyra søguna handan frímerkjaútgávuna. Myndristarin Martin Mörck og listamaðurin Michael Melbye vóru eisini til staðar at signera.

Umleið 300 fólk vóru til hesa væleydnaðu framløgu. Omanfyri síggja tit nakrar myndir frá degnum.



Aftasta rað frá vinstru:
Ada í Líð, Tórun Højgaard, Maibritt Müller, inga Joensen, Hildur Mortensen, Marianna Nattestad, Jóhanna Danielsen, Alma Dalsgarð, Ann Zachariasen,
Fremsta rað frá vinstru:
Maud C. á Geilini, Annvør Manai, Eyðun Husgaard, and Korinta Jarnfoss



Svanbjørg Manai, stjóri
Posta Stamps

# Vit á Posta Stamps

**Starvsfólkini**
Hetta eru núverandi starvsfólkini á Frímerkjadeildini ella sum vit eisini kalla okkum "Posta Stamps". Tað eru vit, ið avgreiða tínar fyrsipurningar og bíleggingar bæði umvegis vanlig brøv, teldupost, heimasíðuna, við faxi og gjøgnum telefonina. Umframt tey sum pakka bíleggingar, stempla frímerkini og annars hava við tilvirkingina av frímerkjunum at gera. Onkran hava tit kanska sæð á frímerkjaframsýningum.

**Frímerkjaútgávurnar**
Frímerkið er ein spegilsmynd av tjóðini. Eitt kaghol innar í landsins sál, útsjóndina, søguna, plantu- og djóralív og ikki minst fólkalív.

Ein lítil mentunarberi, ið røkkur langt handan landamørk, langt út í heimsins fjarastu krókar og skot.

Á einum lítlum pappírslepa, ikki meira enn einar tveir sentimetrar til støddar, kunnu vit siga frá mongum forvitnisligum og tað hevur altíð verið endamálið við teimum føroysku frímerkjunum.

Tey seinastu árini eru vit vorðin sera varug við leiklutin hjá frímerkinum sum mentunarboðberi og hava lagt frímerkjaútgávurnar til rættis við hesum í huga.

Tíðin tá tað var nokk at avmynda landsins stóru synir og døtur er farin - vit vilja heldur lýsa hvat viðkomandi hevur lagt úr hondum. Og samstundis royna at lýsa tann innara heimin hjá myndlistafólki, rithøvundum og yrkjarum.

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 21. mars og 30. apríl 2012



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Norðl. útgáva - Bjargingartænasta** |
| Útgávudagur: | 21.03.2012 |
| Virði: | 2 x 10,50 kr. |
| Nummur: | FO 731-732 |
| Frímerkjastødd: | 29,5 x 38,5mm |
| Arkstødd: | 105 x 70 mm |
| Tekningar: | Edward Fuglø |
| Prenthåttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | OeSd, Eysturríki |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa, 0-50 g |






Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Europa 2012 - vitjið Føroyar** |
| Útgávudagur: | 30.04.2012 |
| Virði: | 6,50 og 10,50 kr. |
| Nummur: | FO 733-734 |
| Frímerkjastødd: | 64,00 x 23,00 mm |
| Photo: | Eyðbjørn Jacobsen |
| Prenthåttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja og til Evropa, 0-50 g. |









Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Skrímsl** |
| Útgávudagur: | 30.04.2012 |
| Virði: | 6,50, 11,00, 17,00 og 19,00 kr. |
| Nummur: | FO 735-738 |
| Frímerkjastødd: | 26,00 x 40, 00 mm |
| Lagt til rættis: | Edward Fuglø |
| Prenthåttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja 0-50 g, miðalbrøv innanoyggja 51-100gr, miðalbrøv innanoyggja 101- 250 gr, stórbrøv til Evropu 51 - 100 gr. |

Framsíðumynd: Viðoy, Svínoy í baksýni. Myndatøka: Eyðbjørn Jacobsen
Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo